# Fíggjarpolitikkurin má aftur á beint nú

**Stóra avbjóðingin í búskapinum í dag er fíggjarpolitikkurin, ið má aftur á beint nú. Javnvág má fáast millum minkandi almennu inntøkurnar og útreiðslurnar, ið eru øktar ov nógv samanborið við framleiðsluna og samlaðu inntøkur Føroya. Halda bygnaðarligu skeivleikarnir fram, og kemur fíggjarpolitikkurin ikki á beint nú, kann tað gerast tungt at fáa almenna hallið burtur aftur**

Búskaparráðið hevur í dag almannakunngjørt búskaparfrágreiðing sína. Í tí sambandi sigur formaðurin í ráðnum, Thomas Dam:

"Nýggja frágreiðingin er eitt reytt ávaringarljós. Avbjóðingarnar eru stórar, serliga hjá tí almenna, ið hevur stórt hall. Hallið hjá landi og kommunum er stórt, og lítið talar fyri, at hetta hallið minkar nóg nógv, tá ið búskapurin vendir. Tí er neyðugt við fíggjarpolitiskum tiltøkum nú, sum komandi árini kunnu tryggja javnvág. Búskaparráðið mælir til, at inntøkurgrundarlagið verður breiðkað, samstundis sum útreiðslurnar verða tálmaðar. Verður fíggjarpolitikkurin ikki broyttur avgerandi, gerst uppaftur tyngri at tryggja javnvág seinni".

Høvuðstættir í nýggju búskaparfrágreiðingini:

- Búskaparliga afturgongdin er steðgað, men enn er ov tíðliga at siga nakað um vøkstur
- Føroyski búskapurin er væl fyri, men hallið hjá landskassanum og kommununum er ov stórt
- Týðandi partur av almenna hallinum kemst av skeivum fíggjarpolitikki
- Minni partur av almenna hallinum stavar frá altjóða búskaparkreppuni, og tí er ivasamt, um hallið minkar stórvegis, tá ið búskapargongdin vendir
- Hóast búskapurin tolir alment hall í nøkur ár, er neyðugt við fíggjarpolitiskum tiltøkum, ið mugu fremjast sum skjótast, meðan fíggjarligt rásarúm er
- Búskaparráðið mælir til at breiðka inntøkugrundarlagið og at tálma útreiðslurnar – bæði til rakstur og íløgur – komandi árini
- Neyðugt er við miðvísari og bindandi ætlan, so fíggjarpolitikkurin frameftir gerst haldførur, tvs. at tað almenna fær javnvág aftur millum inntøkur og útreiðslur
- Samskipan má fáast í lag millum land og kommunur um samlaðan karm fyri inntøkur og útreiðslur einstøku fíggjarárini
- Miðvís og bindandi ætlan eigur m.a. at áseta ítøkilig mál fyri hvussu stórt almenna halli kann vera frameftir; hvørjar inntøkur skulu økjast frá 2011 og fram; hvørjar útreiðslur skulu skerjast frá 2011 og fram; og nágreiniliga raðfesta íløgur eftir ávísum reglum
- Fæst fíggjarpolitikkurin ikki á beint aftur nú, verður helst neyðugt við harðligum tiltøkum seinri

Fleiri upplýsingar eru í sjálvari búskaparfrágreiðingini, ið kann takast niður av internetinum á hesi slóð: www.buskap.fo. Formaðurin í Búskaparráðnum, Thomas Dam, er at hitta á tel. 591111